**Til FJØLMIÐLAKÆRUNEVNDINA**

Fjølmiðlanevndin
c/o Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka
Postboks 45
110 Tórshavn

Tann 19. Mars 2019 kærir landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum,

Norðlýsið til Fjølmiðlakærunevndina.

Kæran er skrivað av Torkil Vestergaard Rasmussen, løgfrøðingur á fiskivinnudeildini og í teldupostinum sæst at kæran hevur verið á borðinum hjá landstýrismanninum sjálvum, hjá aðalstjóranum, Rógvi Reinert og hjá deildarleiðaranum á Fiskivinnustovuni, Andras Kristiansen.

Í kæruni verður ført fram at Norðlýsið í grein á nordlysid.fo tann 18. mars 2019 kl. 12:08:

*”…. Verður umsitingin í Fiskimálaráðnum løgd undir fyri at vátta yvir fyri Norðlýsinum at landsstýrismaðurin onga LÓGARHEIMILD hevði at geva undantaksloyvi….”*

**Landsstýrismaðurin og Fiskimálaráðið seta fram álvarsamar hóttanir ímóti Norðlýsinum**

Í kæruni, sum leiðslan í Fiskimálaráðnum hevur skrivað vegna landsstýrismannin í Fiskivinnumálum, verður álvarsom hóttan sett fram ímóti Norðlýsinum.

Máttmiklasti landsstýrismaðurin hjá sitandi samgongu, hóttir enntá Norðlýsið við at stevna fjølmiðilin fyri rættin.

Landsstýrismaðurin skrivar umvegis løgfrøðing í Fiskimálaráðnum m.a. Soleiðis:
”… *Um talan* ***verður*** *um revsimál, er ikki óhugsandi at tilíkur fjølmiðlaatburður er fevndur av §268 í revsilógini….*”

____

§ 268 í Revsilógini:

*Tann, sum setir fram ella breiðir út skuldseting ímóti betri vitan, ella sum ikki hevur rímiliga orsøk til at halda skuldsetingina vera sanna, verður revsaður fyri útspilling. Revsingin í § 267 kann tá vaksa til **fongsul í upp til 2 ár**.*

Sostatt hóttir landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Høgni Hoydal, blaðstjóran á Norðlýsinum seinastu 40 árini, Oliver Joensen og prentaran, John William Joensen við 2 ára fongsulsrevsing fyri nevndu grein við yvirskriftini: *" Landstýrismaðurin í Fiskivinnumálum hevði onga lógarheimild at geva undantaksloyvi".*

Vit kunnu samstundis staðfesta at landsstýrismaðurin og fiskimálaráðið ætla ikki at viðurkenna dómin hjá Fjølmiðlakærunevndini, men ætla sær víðari í rættarskipanina við Norðlýsinum, skuldi fjølmiðlakærunevndin ikki givið kæraranum viðhald í kæruni

——

Í kæruni, sum ovasta leiðslan í Fiskimálaráðnum hevur sent fjølmiðlakærunevndini verður m.a. sagt:

*….. Upplýsast skal, sum tað longu framgongur av hjálagda samskifti, at Fiskimálaráðið ongantíð hevur váttað fyri Norðlýsinum at landsstýrismaðurin hevur disponerað í **heimildarloysi**….*

Hetta er at spæla við orðum og at tulka yvirskriftina í Norðlýsinum í sera strammum løgfrøðiligum tulkingum, sum als ikki kann brúkast í samband við arbeiði hjá fjølmiðlunum, har uppgavan er at avdúka ivingarsom viðurskiftir. Hetta arbeiði krevur at fjølmiðlar hava neyðugt frælsi við orðingum, soleiðis at borgarar kunnu skilja annars torrskild mál.

Fjølmiðlar mugu hava loyvi til at kallað ein spaka fyri ein spaka, uttan at verða bundin niður av ótta fyri at verða fangaði í onkrari løgnari løgfrøðiligari tulking ella vending.

Hetta seinasta samskifti, sum kæran frá landsstýrismanninum snýr seg um, skal síggjast sum partur av einum umfatandi samskifti, sum Norðlýsið hevur havt við Fiskimálaráðið, reiðarar, leiðslufólka uppisjóvarvirkjum og Vørn. Samskiftið er sera umfatandi og hevur koyrt alt tíðarskeiði, sum landsstýrismaðurin og Fiskimálaráðið hava útluta menningarkvotur til útvaldar persónar og feløg.

Niðanfyri fara vit at geva kærunevndini innlit í ein part av hesum drúgva samskifti Norðlýsið hevur í samband við menningarkvoturnar. Eisini er samskifti millum undirritaða, fiskimálaráðið, tingfólk og onnur.

**Norðlýsið hevur liva upp til sítt endamál sum fjølmiðil sambært leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið og samstundis megnað avdúka ivasom viðurskifti.**

Í samband við at landstýrið í heyst fór at útluta ávísum vinnurekandi feløgum og persónum part av uppisjóvartilfeinginum, hevur Norðlýsið fram um aðrar miðlar fylgt gongdini sera tætt.

Vit hava staðfesta at størsti parturin av teimum, sum høvdu fingið tilluta menningarkvotu, komu beinan vegin í óføri, tí landsstýrismaðurin hevði luta teimum tilfeingið, sum allarflestu aktørarnir ikki á nakran hátt vóru mentir at umseta/virka til krónuvirðir.

Út frá samskifti við vinnulívsfólk, fiskimálaráðið og politisku skipanina eru vit sannførd um **at** áðrenn landsstýrismaðurin setti ein vinman og flokksfelaga, sum formann fyri metingarnevndina, at meta um egnaðar verkætlanir, sum skuldu menna nýggjar vørur og virðisøkja náttúrutilfeingi og skapa arbeiðspláss í landaøkjum við arbeiðsloysi og minkandi fólkatalið,

**vistu** baði landsstýrismaðurin og embætisverkið í Fiskimálaráðnum, at nógv tann størsti parturin av teimum, ið móttóku menningarkvoturnat, á ONGAN HÁTT vóru førir fyri at halda seg til treytirnar, sum settar vóru teimum í Lóg um Sjófeingi.

Men politiska skipanin var í tí truplu støðu, at hon toldi ikki at menningarkvoturnar **ikki** vóru útlutaðar í 2018. Tá nýggja fiskivinnuskipanin endaliga bleiv samtykt beint fyri jól í 2017 var einasta orsøkin til at meirluti fekst í seinastu løtu í Løgtinginum - nevniliga meningarkvoturnar.

Við at seta uppskot fram um at deila út uppisjóvartilfeingið til “nýggjar aktørar” kring um í landinum *(Menningarkvoturnar komu uppí lógina undir seinastu viðgerðini í Løgtinginum)* - fekst undirtøka endiliga fyri einari “nýskipan av fiskivinnuni”, sum Tjóðveldi, Javnaðarflokkurin og Framsókn” høvdu lova veljarum sínum.

Støðan var ótolandi hjá landsstýrismanninum. Tí hann hevði líka síðan hann tók við roynt seg við uppboðsølum av fiskatilfeinginum á ymiskan hátt uttan at nakar nýggjur aktørur var komin inn í vinnuna.

Nú SKULDU nýggir aktørar inn í vinnuna - og fyri at tryggja sær at metingarnevndin *(metingarnevndin ger tilráðing til landsstýrismannin um verkætlanir og ger tilmæli til landsstýrismannin um hvør skal fáa menningarkvotu/uppisjóvartilfeingi)* gjørdi sítt arbeiði, eftir politiska leistinum hjá landsstýrismanninum, setti Høgni Hoydal vinmannin og flokksfelagan Gestur Hovgaard, sum formann fyri serligu metingarnevndini.

Í skjølum frá Fiskimálaráðnum sæst at útveljingin av nevndarlimum til nevndina, sum skuldi avgera hvørjir persónar skuldi fáa menningarkvotir ókeypis frá landinum,  varð gjørd eftir óformligar samrøður millum landsstýrismannin og ovastu leiðsluna í Fiskimálaráðnum og einstøku limirnar *(samrøður og telefonsamrøður - eingi notat)*.

Tá metingarnevndin er saman til fyrsta fundin er landsstýrismaðurin sjálvur við á fundinum og tryggjar sær at vinmaðurin Gestur Hovgaard gerst formaður. Sambært fundarbókini skipaði landsstýrismaðurin sjálvur nevndina:

*(Red:* Landsstýrismaðurin tekur fyrst orðið:)
*.... takkar fyri at limirnir játtaðu at gerast limir í nevndini. Skjóti upp, at Gestur Hovgaard verður formaður í nevndini og Ásmund Guðjónsson verður varaformaður. Varalimirnir skulu rokna við at gerast meira virknir enn varalimir vanliga eru.......*

(Red: Sum sæst so heldur Landsstýrismaðurin at tað hevur stóran týdning at fjølmiðlar verða hildnir burtur frá arbeiðinum hjá nevndini:)

*Landsstýrismaðurin minnir nevndarlimirnar á: ......at alment innlit ikki kann latast í vinnuligar trúðnaðarupplýsingar...... tilmælið má vera Fiskimálaráðnum í hendi skjótast til ber.....*

*Metingarnevndin, sum Høgni Hoydal sjálvur fleiriferðir alment hevur sagt at verða óheft av landstýrismanninum, fær skrivstovu/fundarhøli í Fiskimálaráðnum - bert fáar metrar frá skrivstovuni hjá Landstýrismanninum í fiskivinnumálum og aðalstjóra hansara.*

Eftirfylgjandi hevur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í fiskivinnu- og mentamálum skotið upp at lógin um innlit í fyrisitingina **als ikki** skal galda fyri umsóknir til menningarkvotur og fylgiskjøl. Eydnast landsstýrismanninum at fáa hesa lógarbroyting samtykta, verða fjølmiðlar fullkomuliga fráskornir møguleikanum at fáa innlit í týðandi partar av almennu umsitingini av menningarkvotum.

LES MEIRA HER https://nordlysid.fo/tidindi/22180/hogni-hoydal-valdi-gestur-hovgaard-til-formann-i-metingarnevndini

Føroysk miðlafólk mótmæla uppá tað harðasta arbeiðsháttinum hjá landsstýrismanninum. Tann 9. mars sendur felagið hjá Føroyskum Miðlafólkum út soljóðandi tíðindaskriv:

*Føroysk Miðlafólk verjir opinleikan*

*Felagið heldur tað hava týdning, at Føroyar eru ein tjóð, sum virðir opinleika, gjøgnumskygni og fólkaræði í breiðasta týdningi. Tí vil felagið stríðast ímóti øllum teimum inntrivum, sum skerja møguleikarnar hjá borgarum og fjølmiðlum at hava eftirlit við, hvussu politiska valdið og fyrisitingin umsita veljarans álit.*
*Eitt aktuelt dømi er ætlanin hjá Fiskimálaráðnum at skerja lógina um alment innlit í mun til lógina um sjófeingi, ítøkiliga í sambandi við menningarkvoturnar. Tað má vera ein sjálvfylgja, at borgarar og miðlar fáa fult innlit í, hvussu ogn Føroya fólks verður umsitin og útlutað.....*

**Landstýrismaðurin og Fiskimálaráðið spæla vinnulívsfólk**

Skuldu nevndu aktørar, sum fingu Menningarkvotur, lívbjarga sær fíggjarliga var øllum greitt at neyðugt var at hjálpa teimum fram á leið - úr tí trongstøðu, sum politiska- og embætis-skipanin hevði sett teir í.

Einasti møguleiki at fáa nýggjar aktørar inn í vinnuna var um teir fingu hjálp ella beinleiðis stuðul frá tí almenna, tí ógjørligt var at fíggja stuttíðarloyvir í føroyskum fíggingarstovnum og lóg um sjófeingi forðar fyri at nýggjir aktørar kundu fáa til vega útlendska fígging.

Aktørarnir í uppisjóvarvinnuni eru sera fáir og kennast tí sera væl persónliga. Teir samskifta- og samstarva dagliga og kenna tí sera væl viðurskifti og trupuleikar hvør hjá øðrum. Haraftur møtast vinnulívsfólk dagliga til fundar umframt at aktørarnir fleiriferðir á hvørjum árið eru uttanlandaferðir saman við embætisfólkum í fiskimálaráðnum og sæman landstýrismanninum sjálvum til millumtjóða fiskivinnusamráðingar.

Veruleikin er at innan uppisjóvarvinnuna, embætisverk og politikarar eru vina- og kenningarbond sera tøtt og í onkrum føri kunnu verða tøtt familjubond.

**Landstýrismaðurin og Fiskimálaráðið vistu fullvæl, at teir settu útvaldu "nýggju aktørarnar" í eina sera trupla ella rættarisagt ómøguliga støðu.**

Efirlitsmyndugleikin Vørn og Fiskimálaráðið hevur eitt sera neyvt eftirlit við aktivitetinum í uppsjóvarvinnuni í samband við fiskiskap og landingar. Tí er eingin ivi um at fiskiveiðumyndugleikarnir kenna alt til trupuleikarnar reiðarar og manningar vóru komnir í av menningarkvotunum teir fingu tillutað.

Norðlýsið hevur enntá fingið at vita at landstýrismaðurin sjálvur og Føroya Løgmaður hava verið vitandi um ruðuleikan, sum valdaði úti á fiskifeltinum og millum virkir á landi ísamband við menningarkvoturnar.

Sum dokumentatión fyri hesum lati eg nevndini eina samrøðu, sum eg sjálvur hevði við virkisleiðaran á Pelagos í Fuglafirði, Fríðin Ziskason, tann 8. november 2018, har hann greiddi Norðlýsinum frá hvussu væl vitandi eftirlitsmyndugleikarnir, írokna landstýrismannin í fiskivinnumálum og Føroya Løgmann, vóru í samband við umrødda fiskiskapin.

Digitala skrásetingar skipanin er nevnuliga sera væl útbygd og hevur eitt fullkomið kontroll við øllum skipum. Skipanin er so væl útbygt at hvørt einstakt skip skal fráboða eftirlitinum nær, hvar og hvat klokkan einstaka skipið landar hvønn túr. Tað eru enntá dømir um at skip, sum eru byrjað at landa áðrenn upplýstu klokkutíðina, hava fingið bót tá mynduleikarnir eru komnir á staðið. Somuleiðis mugu einstøku skipini biðja um loyvi frá eftirlitsmynduleikanum, hvørjaferð einstøku skipini eru klár at byrjað nýggjan túr. Tá neyðug loyvi eru komin frá mynduleikanum kann skipið loysa frá bryggju.

*LURTA EFTIR VIÐLØGDU UPPTØKU*
*(Samrøðan við Fríðin Ziskason virkisleiðara á Pelagos er upptikin í samband við kanningararbeiði at brúka sum dokumentatión. Samrøðan er gjørd tann 8. november 2018.*

*Byrja 2:50 minuttir inni í samrøðuni og lurta eftir restini av fílinum.)*
*https://vimeo.com/326745670*
*Loyniorð: Nordlysid070269*

Fráboðanarskyldan hjá skipum er lýst í kunngerðum frá landsstýrismanninum á hvørjum árið.

Vørn far hvønn dag boð frá skipum um nær og hvar landað verður og við hvørjum fiskiloyvi tey fiska. Í fiskiloyvinum er tilskilskilað hvat slag av fiski talan er um, um talan er um menningarkvotu ella annað slag av kvotum o.so.fr.

**Ruðuleiki valdar á fiskifeltinum og millum virkir á landi.**

(brot úr greinum og innlitstilfarið sum lýsa hvussu ruðuleikakend støðan er)

**Tann 13. august 2018**
fingu feløg kring landið tillutað menningarkvotu

**Tann 14. september 2018**
boðar P/F Vørustíggjur Fiskimálaráðnum frá at eingin møguleiki var framleiða nakað á virkinum á Sandi, men víst var á at møguleiki var fyri at virkið í Skopum við ávísum broytingum kundi taka ávísa nøgd av menningarkvotu…….

**Tann 17. september 2018**
boðaði Fiskimálaráðið P/F Vørustíggjur frá at upplýsingarnir frá 14. september 2018 vóru viðgjørdir og verkætlanin fekk tillutað 1.301 tons av makreli, 1.000 tons av sild í menningarkvotu….. og samskift verður beinleiðis millum vinnurekandi partafelagið og embætisverk/politisku leiðsluna í Fiskimálaráðnum um hvar á Sandoynni uppisjóartilfeingið kann fáast til høldar…..

**Tann 25. oktober 2018**
boðar P/F Vørustíggjur Fiskimálaráðnum frá at samstarvið við Sandoy Seafodd er ikki komið í lag og sær ikki út til at koma í lag……

**Tann 31. oktober 2018**
var Fiskimálaráðið í samskifti við VØRN um landing av menningarkvotu í Eystur- og Vesturbúgvin higartil hava fiskað. VØRN hevur váttað at trolararnir hava landað umleið 240 tons av makreli í Fuglafirði, ið er menningarkvota……

**Tann 1. november 2018**
sendir Fiskimálaráðið felagnum Vørustíggjur eitt ætlanarskriv um afturtøku av tilsókn at fiskað menningarkvotu 2018.

**Tann 8. november 2018**
skrivar Norðlýsið grein um støðuna í samband við menningarkvoturnar:

*"….Tað er reint kaos umborða á skipum, á skrivstovum hjá reiðarum og virkjum, hjá eftirlitsmynduleikanum og á hægsta politiska stigið í samband við menningarkvoturnar í løtuni. Tey sum arbeiða "menningar-fiskin" kenna seg ikki álvilig við støðuna, sum tey kalla "Wild West….."*

*……… Fyri at fáa fiskin upp úr sjónum og inn á virkið og síðani haggreiddan, er ein kost prísur. Tey effektivastu virkini megnað at keypad fiskin fyri tríggjar til tríggjar ein hálv krónur kilo. Ein av aktørunum, sum hevur fingið part av menningarkvotunum og sum skal framleiða fiskin í einari ávísari bygd, skal kanska hava fimm krónur og hálvfjers, tá fiskurin ferð út gjøgnum hurðina á virkinum. Skipið skal hava tríggjar krónur og hálvtríðs oyru og tí gevur tað seg sjálvt at virkið, sum*

*skal framleiða fiskin, framleiður við undirskoti. So er bara ein møguleiki eftir og tað er at koyra prísin, sum skipið fær niður á tvær krónur og hálvtríss, men so fær virkið Jan Højgaard & co. uppá nakkan…..*

*….  Sum støðan er í løtuni er kostprísurin ov høgur hjá teimum, sum hava fingið kvotur frá landsstýrismanninum. Serliga álvarsom er støðan í sildini tí hon kostar tað sama sum makrelurin at fáa til høldar, men hon hevur nógv minni virði.*
*Norðlýsið kannaði støðuna hjá einum ávísum skipið, sum lá við bryggju og landaði í morgun….*

*…. Veruleikin er at teir sum hava fingið sild og svartkjaft frá landstýrismanninum í menningarkvotu, arbeiða við undirskoti. Tí royna teir nú sum frægast at selja menningarkvotur til teir sum geva besta prísin meðan embætisfólk og fremstu politikarar í landinum standa sum ryssa yvir deyðum fyli……*

*….. Rógvi Reinert aðalstjóri, sigur við Norðlýsið at teir saman við Vørn fylgja gongdini og hann váttar eisini at onkur hevur biðið ráði um undantaksloyvi at landa menningarkvotur til annað enn kvotan var latin til. Men hann hevði annars onga viðmerking uttan at teir fylgdu gongdini saman við Vørn. Stjórin á Vørn vísti til Fiskimálaráðið……*

**Tann 9. november 2018**
skrivar Fiskimálaráðið bræv til fleiri aktørar og biður um frágreiðing um hví Menningarkvotur ikki verða landaðar í økjum ella til virki sum ásett er í tilsóknunum um menningarkvotu.

*Vestmanna Fiskavirkið verður biði um eina frágreiðing….*

*Delta Sefood fær eitt ætlanarskriv um ætlaða afturtøku av tilsøgn at fiska menningarkvotu í 2018…*

**Tann 9. november 2018**
svara Delta Seafood Fiskimálaráðnum og skrivar m.a.:

*….vit vístu í maili 25. oktober 2018 og í telefonsamrøðu sama dag á broyting hjá okkum at fiska og virka sild og halda ikki at vit hava kunnað verið meira opin og erlig um støðuna. Vit hava tikið móti góðum 50 tonsum til royndir, hóast vit als onga sølu hava, sum gevur nakað lønandi framleiðslu, men halda okkum hava funnið eitt produkt, sum fer at geva okkum lønandi framleiðslu til komandi ár, tá vit vanta at fáa menningarkvotu…..*

*…. Tað kann verða at eg havi misskilt støðuna, men eg skilti støðuna soleiðis frá samrøðuni tann 25. oktober, at tit ikki høvdu viðmerkingar til at vit fiskaðu sildina sum vit gjørdu, nevnt bleiv eisini at sildin mátti fiskast. Hetta áðrenn vit fóru undir at fiska. So um vit høvdu skilt at tað fór at fáa avleiðingar fyri makrelin, so høvdu vit ikki fiskað sildina. Eg haldi at vit eftir umstøðunum hava kunnað tykkum á nøktandi hátt…..*

**Tann 9. november 2018**
Fra P/F Steintór og P/F TG fish ætlanarskiv um afturtøku av tilsagn um at fiska meningarkvotu í 2018…..

*… Artic Voyager hevur landað 950 tons av menningarkvotu í Fuglafirði…..*

**ÓSKRIVAÐAR REGLUR brúktar sum politiskt jarnbrot**

Sum sæst á brotpørtunum av tí samskifti, sum Norðlýsið hevur fingið innlit í og omanfyri er lati nevndini, at stórt trýst er á landstýrinum at gera okkurt fyri at umgangast at ikki allarflestu menningarkvoturnar vóru tiknar frá hesum "nýggju aktørunum".

Fiskimálaráðið fór tí undir eina skáksigling, sum er rættiliga ivasom, og sum einans hevur elvt til meira ruðuleika - alt fyri at verja landstýrismannin og landsstýrið frá at missa andlit politiskt.

Amboðið er **óskrivaðar fyrisitingarrættarligar meginreglur…….**

Síðani byrjar ein sera marghåttlig sortering av verkætlanum í fiskimálaráðnum har ráðið velur at taka menningarkvotur inn aftur frá summum aktørum samstundis sum aðrir aktørar verða tiknir undir veingirnar hjá ráðnum og landstýrismanninum.

Hetta fyrisitingarliga amboð, sum er ætlað til at brúka tá **LANDSINS virðir** eru í vanda, verða nú bráddliga nýttar sum amboð hjá Fiskimálaráðnum og landstýrinum at tryggja raksturin hjá ávísum vinnurekandi partafeløgum og íløgur, sum ávísir privatir persónar hava gjørt.

**Tann 15. november 2018**
skrivar Fiskimálaráðið til Delta Seafood á Tvøroyri:

*…..  skal Fiskimálaráðið herviðboðst frá at Fiskimálaráðið fer at geva P/F Delta Seafood eina ávaring við herdum treytum um frameftir at gagnnýta restina av menningarkvotunum í 2018 innanfyri verkætlanina.*
*Fisimálaráðið hevur sambært* ***óskrivaðu fyrisitingarrættarligu meginreglunum*** *um afturtøku av givnum tilsagnum (tilbagekaldelse af begunstigende) heimild til at taka tilsókn aftur, og tískil hevur Fiskimálaráðið eisini, sum tað minna í tí meira, heimild til at geva ávaringar fyri brot á grundleggjandi fyritreytir, eins og Fiskimálaráðið hevur heimild til at áseta herandi treytir….*
*…. Fiskimálaráðið hevur fingið upplýst frá VØRN at skipið Artic Voyager hjá P/F Jókin, sum hevur fiskað menningarkvotu fyri tykkum, hevur landað uml. 940 tons av Norðhavssild í Fuglafirði. Talan er um menningarkvotu. Sostatt er so at siga øll sildakvotan hjá Delta Seafood gagnýtt uttanfyri verkætlanina og hetta er gjørt uttan fráboðan ella góðkenning frá Fiskimálaráðnum, sum annars er ásett í treytunum.*

*Landingar, sum í stóran mun eru framdar uttanfyri økið……*

**Tann 15. november 2018**
sendir Fiskimálaráðið *"Avgerð um afturtøku av tilsøgn um menningarkvotu í 2018"* til *P/F Vørustíggjur……*

**Tann 16. november 2018**
skrivar Norðlýsið m.a.:
*" ……. Vørn og umsitingin í Fiskimálaráðnum hótta nú við at taka menningarkvotur aftur….. Eftir at VØRN hevur staðfest at ein stórurpartur tilfeinginum, sum útvaldir aktørar fing útluta ókeypis frá landstýrismanninum í fiskivinnumálum, sum Menningarkvotu IKKI eru brúktar sum tilsagnirnar annars fyriskipa, hóttur Fiskimálaráðið nú við at krevja menningarkvoturnar aftur frá aktørunum….*

*… Áhugavert er at síggja, at í samband við hóttan um afturtøkuna vísir Fiskimálaráðið ikki til "Lóg um sjófeingið", men til heimildir í "…**óskrivaða meginreglan um afturtøku av givnum tilsagnum…"** og víst verður eisini í hesum sambandi á fyrivarnið í tilsagnum fyri broytingum, sum ikki liggja innanfyri verkætlanina, og sum tí ikki lúka treytirnar fyri tilsagnunum.....*

*….Aktørarnir svara hinvegin, at teir alla tíðina hava kunna Fiskimálaráðið um støðuna og hava verið opin og erlig.... og at fiskimálaráðið sjálvt hevur sett aktørar í eina ómøguliga støðu við útlutingar hátti og treytum...*

*LES INNLITSTILFAR HER*
*https://nordlysid.fo/upload/tinymce/a5e8c2dd446d52f5d958347bafd522d6d360f1d1.pdf*

**Tann 14. desember 2018**
skrivar Norðlýsið at "*Manningar missa nógvan pening upp á menningarkvoturnar*"….

*Sambært tølum frá Vørn sæst at virkir sum hava menningarkvotu gjalda skipum munandi lægri prís enn virkir, sum onga menningarkvotu hava. Munurin er heilt upp til tvær krónur pr. kg. fyri makrel. Tummas T hevur sambært Teyggjuni eitt ískoytisloyvi frá Vestmanna Fiskavirkið og veiðan og avreiðingarprísur síggjast á heimasíðuni hjá Vørn. Fram hevur sambært teyggjuni trý ískoytisloyvi frá Delta Seafood, TG Seafood í Hvalba og Vestmanna Fiskavirkið.*

*Veiðan og søluprísirnir hjá Tummas T og Fram, sum fiska menningarkvotu, kunnu samanberast við avreiðingarprísin hjá øðrum uppisjóvarskipum á heimasíðuni hjá Vørn*

**Tann 14. desember 2018**
skrivar Norðlýsið ……. *Jan Højgaard: Vit kunnu als ikki liva við hesum sum gongur fyri seg í fiskivinnuni…..*

*Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag sigur at teir hava ávara ímóti tí spekulatión, sum nú sæst viðvíkjandi menningarkvotunum.*
*Sum vit skrivaðu fyri løtu síðan fáa skip, sum fiska menningarkvotur fyri virkir á landi upp til tvær krónur minni fyri uppi sjóvartilfeingi.*

*- Vit hava ávarað baði landsstýrið og løgtingið at hatta fór at verða úrslitið tá man loysti veiðuloyvini frá skipinum. Men lurta var ikki eftir okkum og nú síggja vit hvussu menningarkvoturnar verða brúktar av spekulantum á landi.*
*Vit kunnu als ikki góðtaka hetta og tað er átrokandi neyðugt at vit fáa veiðiloyvini inn í skipanina aftur.*
*- Sum gongdin er í løtuni endar alt í hondunum á strámonnum. Tað gevur onga meining at flyta pengar úr fiskivinnuni sum virkar á sjónum, og geva teir til spekulantar sum eru uppi á landið.*
*- MEN eg kann bara staðfesta at hetta er júst tað sum politiska skipanin hevur gjørt, men tað hevur higartil verið vónleyst at fáa tey at skilja hetta, sigur Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag.*

**Politisk undantaksloyvir til útvaldar aktørar**

Um ársskiftið var greitt at stórar nøgdir av menningarkvotunum, serliga svartkjaftur vórðu landaði til Havsbrún í Fuglafirði, sum framleiður til alifóður, og tíðliga um morgunin tann 5. januar 2019 fór undirritaði til Fuglafjaðar við myndatólinum…..

**Tann 5. januar 2019**
**kl. 09:59**
skrivar Norðlýsið:

*…….Miðvingar landa menningarkvotu til virki hjá Bakkafrost.*
*Katrin Jóhanna úr Miðvági, sum hevur loyvi at fiska 2.500 tons av svartkjafti av menningarkvotu, sum skuldi mennast á Snarfrost í Miðvági, landar í morgun alla lastina, góð 1.700 tons av svartkjafti til Havsbrún í Fuglafirði.*
*Tað ljóðaði annars í miðlunum fyri kortum, at um ikki var gjørligt at fáa menningarkvotuna virkaða á virkinum í Miðvági var ætlanin í fyrstu atløgu at landa til virkini í Hvalba og Vestmanna.*
*Katrin Jóhanna og Snarfrost hava fingið tillutað menningarkvotu í fýra ár: 10.400 tons av svartkjafti, 2.002 tons av makreli og 1.593 tons av sild.*
*Tað er stóri alirisin Bakkafrost, sum eigur Havsbrún og sum framleiður mjøl og lýsi.*
*Tað eru útlendingar sum eiga meirilutan í Bakkafrost…..*

**Tann 5. januar 2019**
**kl. 21:03**
skrivar høgra hond hjá landstýrismanninum í fiskivinnummálum, Ingolf S. Olsen, sum er framsøgumaður hjá Tjóðveldisflokkinum í fiskivinnumálum, eina sera bersøgna og opinskarað lesarbræv, har hann vísir á hvussu tætt sambandið hevur verið millum vinnulívsfólkini, embætisverkið og sjálvan politiska myndugleikan á Fiskivinnuøkinum:

*Alt fer rætt fram við Katrin Jóhonnu*

*Norðlýsið undrast í grein á, at nýggja vágaskipið Katrin Jóhanna landar svartkjaft, sum er fiskaður av menningarkvotu, til ídnað á Havsbrún í Fuglafirði.*

*Men tað er við loyvi frá Fiskimálaráðnum, at Katrin Jóhanna í løtuni fiskar og landar svartkjaft í Fuglafirði. Tískil er tað eisini í samsvar við verkætlanina, sum menningarkvotan er latin til, at hetta verður gjørt……*

*…….reiðaríið p/f Kinnfelli – at teir ongantíð hava gjørt nakað sum helst í sambandi við menningarkvoturnar, uttan at tað er gjørt í samráð við Fiskimálaráðið og myndugleikarnar annars….*

*……. og sjálvur eri eg ógvuliga errin um, at Vágar hava fingið lut í menningarkvotum, og at tær eru í so góðum hondum, sum tær eru……*

*….. Ongin,* ***heldur ikki politiski <u>myndugleikin</u>****, hevði heldur roknað við, at øll tey umleið 10.000 tonsini av svartkjafti, sum árliga svarkjaftakvotan er upp á, beinanvegin fóru at kunna virkast og mennast í Miðvági. Men vónandi fer virkið at røkka langt í so máta, so hvørt sum fýra ára skeiðið fyri menningarkvotuna líður…..*

*…… Eisini har er talan um at byrja á berum, so sjálvsagt skal eisini verða rúm fyri royndarkoyring ta fyrstu tíðina……*

Norðlýsið hevur flutt seg frá at verða eitt blað til at verða ein netmiðil við eini heimasíðu og eisini at verða ein sera virkin føroyskur miðil á facebook:

Stutt eftir at greinin um uppisjóvarskipið, sum landar menningarkvotu í Fuglafirði, við undantaksloyvi frá Fiskimálaráðnum varð løgd út á neti, royndu vit eisini at skapa tjak um evni á Facebook síðuni hjá Norðlýsinum og hjá undirritaða sjálvum.

Settir vóru nakrir almennir spurningar fram til Landsstýrismannin, m.a.:

*Til Harra Høgna Hoydal:*
*Hvør munur er á húsavíkingum og miðvingum? Fyrst valdi tú at geva hesum røsku bygdamonnum menningarkvotu.*
*Men tá Vørn sá at húsavíkingar høvdu landa í Fuglafirði tókt tit kvoturnar frá teimum?*
*Og tú segði at hetta vísti at skipanin riggaði?*
*Nú hava miðvingar eisini landa menningarkvotu í Fuglafirði, men tað er í fínasta lagið, tí teir siga seg hava fingið undantaks loyvi frá tær?*
*Hví fingu húsavíkingar ikki eisini undantaksloyvi?*
*Tá høvdu húsavíkingar enntá avreitt til eitt virkið við føroyskum eigarum??*

**Kann undantak gerast uttan lógarheimild?**

Gjøgnumgangandi tráðurin í hesum máli er, at landsstyrismaðurin hevur tillutað nakrar menningarkvotur til útvaldar aktørar. Hesir aktørar liggja teir flestu í valdømum, har Tjóveldið hevur tingmann valdan.

Ì loyvinum eru treytir settar. Ì nøkrum førum fáa hesir útvaldir aktørar álvarsama reaktión, tí teir ikki hava hildið treytirnar, meðan aðrir fáa eitt "undantak". Tað ber slett ikki til at fylgja hvat vendur upp og niður.

Landsstýrismaðurin heldur, at hann bara av sínum eintingum kann geva undantak. Heimildin fyri avgerðini er sambært Fiskimálaráðnum vanligi rætturin at geva undantak.

Hettar metur Norðlýsið verða ein sera løgin grundgeving, tí tá talan er um umsiting av okkara fiskivinnu hoyra vit annars dagliga, at hettar og hattar ikki er møguligt, tí lógin heimilar ikki hesum. Lóggávan verður umsitin og er orða soleiðis, at undantøk krevja lógarheimild.

Hettar er eisini rímunuligt, ikki minst tá hugsa verður um politiska útluting av samfelagsins virðum. Tá mugu vit kunna krevja greiðar reglur, og at umsøkjararnir skulu halda treytirnar.

Sambært galdandi lóg um umsiting av sjófeingi er eisini heilt greitt, at møgulig undantøk krevja lógarheimild. Tað er bara at hygga í lógina. Lógin gevur ávísar heimildir fyri, at landsstýrismaðurin kann geva undantøk.

Reglur um undantøk eru at finna í § 6, stk. 3, § 7, stk. 3, § 9, stk. 2, § 10, stk. 12, § 24, stk. 2, § 37, stk. 2, § 41, stk. 4, § 42, stk. 3, § 48, stk. 3, § 49, stk. 2, § 50, stk. 2, § 58, stk. 3, § 74, stk. 10 og § 80, stk. 4.

Um tað var so lætt, sum Fiskimálaráðið førur fram, at landsstyrismaðurin kann velja og vraka nær hann skal geva undantak í mun til menningarkvotur, hví skal landsstyrismaðurin so i øllum øðrum føri hava lógarheimild.

Tað er okkara fatan, at lógin er sett soleiðis saman, at undantak í samband við veiðuloyvir v.m. krevja serliga lógarheimild, og soleiðis hevur tað eisini altíð verið síðandi løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap bleiv samtykt í 1994.

**Løgtingslimur leggur eftir Norðlýsinum**

Eftir at Norðlýsið biður um viðmerkingar frá framsøgumanninum hjá Tjóðveldi í fiskivinnumálum, fáa vit lesarabræv sendandi frá Ingolf S. Olsen, og verður tað óredigerað lagt út á Norðlýsið. Samstundis verða spurningar til landsstýrismannin lagdir út á Facbook og leinkjaðir til facebook-vangan hjá landsstýrismanninum.

***Fra:*** *John William Joensen <jwj@nordlysid.fo>*
***Dato:*** *lørdag den 5. januar 2019 kl. 10.21*
***Til:*** *Ingolf Sólheim Olsen <ingolfo@logting.fo>*
***Emne:*** *Til Viðmerkingar*
*Hugsaði at fáa eina viðmerking frá framsøgumanninum hjá Tjóðveldi í Fiskivinnumálum:*
*https://nordlysid.fo/tidindi/57843/midvingar-landa-menningarkvotu-til-bakkafrost*

——

*Ingolf Sólheim Olsen <ingolfo@logting.fo>*
*Lør 05-01-2019 16:55*
*Alt fer rætt fram við Katrin Jóhonnu.docx*
*13 KB*
*Hey John William*
*Eg havi skrivað eina lítla grein sum svar. Eg sendi hana bara til tín fyrst, so tú hevur hana einsamallur eina løtu, men um ein tíma sendi hana til aðrar miðlar eisini.*
*Vh*
*Ingolf*

———-

Eftir at lesarabrævið frá løgtingsmanninum er lagt út á nordlysid.fo og eisini aðrar portalar, er løgtingsmaðurin í øðini inn á Norðlýsið um at lesarabrævið er lagt út og at undirritaði hevur brúkt greinina til at seta landsstýrismanninum í fiskivinnumálum nakrar spurningar.

Ikki er óhugsandi at tingmaðurin hevur fingið "oyruni í maskinuna" úti í Fiskimálaráðnum fyri sín opinleika í lesarabrævinum.

*Ingolf Sólheim Olsen <ingolfo@logting.fo>*
*Lør 05-01-2019 20:32*
*John William Joensen*
*Eg bíðaði í meira enn ein tíma.*
*Hatta er annars ein løgin máti at interviewa upp á, bara at senda ein mail og so dúva upp á, at eg síggi hann einaferð. Frammanundan hevur tú so skrivað eina eittbeinta søgu.*
*Tað er ikki journalistikkur. Tað er tað heldur ikki, tá tú síðani fert í kríggj við mína umbidnu viðmerking.*
*Tað mást tú gjarna, men tú eigur at upplýsa veruliga endamálið, tá tú biður um eina viðmerking.*
*Hatta klóraríið hjá tær um Katrin Jóhonnu er ikki journalistikkur, men bara tínar persónligu meiningar og aversjónir, ið skuldu luftast.*
*Um tú nakrantíð biður meg um eina viðmerking aftur, so vil eg fegin hava at vita, um tað skal brúkast sum liður í journalistiskari viðgerð ella sum krút í tínum egna persónliga spinnaríi og lobbyvirksemi.*
*Vinaliga*
*Ingolf*

——-

*Den 5. jan. 2019 kl. 23.42 skrev John William Joensen <jwj@nordlysid.fo>:*
*Eg gjørdi mær tann ómak at skrivað eina redaktionella tíðinda grein um menningarkvotur sum enda sum alifóður hjá Havsbrún.*
*Eg bað teg, høgna, rógva reinert og løgman viðmerkja.*
*Tú sendi mær síðani eitt lesarabræv sum svar sum tú segði at tu fór at senda øðrum miðlum.*
*Eg havi einki respons fingið frá hinum.*
*Eftir at hava lagt lesarabrævið hjá tær á norðlýsið og á facebook vangan hjá nordlysinum, setti eg nakrar almennar spurningar sum viðmerkingar til lesarabrævið á facebook har vit vanliga kjakast við lesarar.*
*Síðani gjørdi eg aftur eina redaktionella grein har eg vísa á hvussu menningarkvotur eru útlutaðar og at fiskimálaráði nú eisini er farið at geva undantøk frá trytunum til ávísan aktør.*
*Her vísti eg ma til lesarabrævið hjá tær har tú sigur at øll skipanin og politiski myndugleikin ( á fiskivinnuøkinum er bara ein) visti at neyðugt varð at víkja frá treytunum í loyvunum......*
*Kanst tú siga mær hvat av hesum ikki er fakta og hvat er spinn????*
*At eg eri farin í "kríggj" við tína viðmerking er láturligt. Eg havi sett fólkavaldum polittikarum nakrar almennar spurningar, men sum eg skilji á lagnum ert tú óður inn á spurningarnar????*
*Og so ákærir tú meg fyri lobbyvirksemið. Kann tú ikki síggja at tað er tú sum ert lobbyist!!!*
*vh.*
*jwj*

——

*Ingolf Sólheim Olsen <ingolfo@logting.fo>*
*Søn 06-01-2019 01:03*
*John William Joensen*
*Eitt lesarabræv, sigur tú? Tú bað um eina viðmerking, og hana fekst tú. Har vóru ongar serligar treytir við, hvussu hon skuldi síggja út.*
*Hatta, tú gert, hevur onki við journalistikk at gera. Eg eri yvirhøvur ikki illur inn á spurningarnar, men tað irriterar meg at brúka tíð upp á fólk, sum royna at fjala lobbyvirksemi og persónligar dagsskráir sum journalistikk.*
*Hví ringir tú ikki til fólk, um tú vilt hava rina viðmerking???*
*Ingolf*

——-

*Ingolf Sólheim Olsen <ingolfo@logting.fo>*
*Søn 06-01-2019 12:22*
*John William Joensen*
*Tað hevur onki við sakina at gera, eftir mínum tykki. Tað, sum eg síggi sum ein trupulleika, er, at tú ikki skilir ímillum tín leiklut sum tíðindafólk og agitator.*
*Men lat okkum bara hava hvør síni sjónarmið um tað; friður veri við tí.*
*Vh*
*Ingolf*

—-

*Den 6. jan. 2019*
*kl. 11.31*
*skrev John William Joensen <jwj@nordlysid.fo>:*
*Síggi at tú eisini hevur lagt lesarabrævið út á tín egna facebook vanga*
*vh*
*jwj*

——

**Fiskimálaráði givið undirhondslyftir?**

Í samrøðu við skiparan og reiðaran á nýggja uppsjóvarskipinum Katrin Jóhannu í Degi og Viku tann 21. januar 2019 váttar Árni Krog Dalsgaard, at felagið longu nú hevur fingið tilsógn frá Fiskimálaráðnum um at felagið er tryggjað menningarkvotu frá Fiskimálaráðnum tey næstu árini.

- *Vit høvdu als ikki farið undir verkætlanina um vit vistu at vit ikki fóru at fáa menningarkvotu tey næstu árini, og vit hava longu fingið indikator uppá at vit fáa part av menningarkvotuni tey næstu árini.....*

Sí her: http://kvf.fo/netvarp/sv/2019/01/21/20190121fyrstimakrelurinkominamidvag

**Landsstýrið gjørdi einki fyri at tryggja at fiskatilfeingið ikki fór fyri skeyti. Landsstýrið tryggjaði einans útvald reiðaríð fíggjarliga**

Tann 7. januar 2019 skrivar www.kvf.fo

*Bara 0,8 prosent fiskað av svartkjaftinum í fjør*
*Bara 350 tons vórðu fiskað av manningarkvotuni av svartkjafti í 2018. Tað er sera lítið í prosentum, tí kvotan var næstan 42.000 tons*

*Bara 350 tons vórðu fiskað av manningarkvotuni av svartkjafti í 2018.*
*Tað er sera lítið í prosentum, tí kvotan var næstan 42.000 tons.*
*Vørn hevur tøl um, hvussu nógv varð fiskað av manningarkvotunum, sum vórðu latnar í fjør.*
*Tey 350 tonsini av svartkjafti fiskaði Katrin Jóhanna.*

*Heldur ikki menningarkvoturnar av makreli og norðhavssild eru brúktar, har eru nøkur túsund tons eftir.*
*Sambært lógini kann landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum í mesta lagi lata 8,5 prosent av føroysku kvotuni av ymsu fiskasløgunum til vinnuligar menningarætlanir kring landið.*
*Í fyrsta umfari varð bara uppsjóvarfiskur latin sum menningarkvota.*
*Menningarkvoturnar í fjør vóru 41.912 tons av svartkjafti, 8.749 tons av makreli og 7.510 tons av norðhavssild, 58.171 tons í alt……*

**Uppgávan hjá fjølmiðlunum.**

Í leiðreglunum fyri góðan fjølmiðlasið stendur m.a. soleiðis um arbeiði ella uppgávuna hjá fjølmiðlunum:
*…..at verja rættin hjá einstaklinginum og rættin hjá fjøldini at verða kunnað. Hesin siður er hornasteinurin, sum fjølmiðlafólk binda seg til at virða eftir..*
*Hesin siður eigur at verða virdur ikki einans sambært orðing síni, men í samljóði við endamál sítt. Hann eigur ikki at verða lagdur út ella tulkaður strangliga fyri at kunna seta til viks aðalmálið at verja einstaklingin, men tó heldur ikki so víðfevnt,* ***at tað skerjir rættin hjá fjølmiðlum óneyðuga til talu-, skrivi- og kunningarfrælsi ella forðar kunning, sum hevur almennan áhuga****. …*
*…. Fjølmiðlar eiga at verja einstaklingar og bólkar fyri órætti frá almennum myndugleikum og stovnum, fyritøkum ella øðrum felagsskapum.*
*Fjølmiðlar hava rætt og skyldu at kunna um tað, ið hendir í samfelagnum* ***og at avdúka <u>ivasom</u> viðurskifti****…..”*

**Fiskimálaráðið letur seg brúka í politiskum spinni**

Tað er einki nýtt at føroyskar ráðharrastovur, sum eru undir valdi av valdsmiklum polittikara, sum landstýrismaðurin í Fiskimálum jú er, hokna undir trýsti og blint lata seg brúka í politiskum spinni. Og tí er sera neyðugt vit væl íklæddum miðlafólkum at avdúka og síggja

gjøgnum roykin av "fake news" og spinn sum verður sent út til miðlarnar. Serliga hava vit uppliva hetta frá Fiskimálaráðnum og her eru tvey fesk dømi frá í ár og 2018:

Tann 22. juni 2018 skrivar Norðlýsið:

*KVF sum miðlapállur fyri landstýrismannin í Fiskivinnumálum*
*Í høvuðstíðindasendingini hjá KVF í útvarpinum, tann 7. juni 2018 á middegi (Kl. 12:20) var landstýrismaðurin í fiskivinnumálum einsamallur í KVF og átti baði høvuðstíðindini og fremsta innslagið. Áðrenn nakar annar miðil hevði tíðindini, hevði KVF loyvt landstýrismanninum, at miðla tíðindini um nevndina, sum saman við landstýrismanninum sjálvum skal deila fólksins ogn, út til persónar "…í ávísum økjum í landinum…" (Red: Orð úr kunngerð, sum landstýrismaðurin sjálvur hevur orða og lýst.)*
*Eftir at landstýrismaðurin, sjálvur (Red: Við nøkrum fáum vegleiðandi spurningum frá útvarpsmanni) hevði greitt Føroya fólki frá hvussu fantastiskar førleikar nevndarlimirnir høvdu og hvussu fantastiska skilagóðar og vælumtóktar "menningakvoturnar" eru, vóru tíðindini løgd kl. 12:33 út á heimasíðuna hjá Fiskimálaráðnum, so aðrir miðlar eisini kundu síggja hvussu fantastiskar fakligar kvalifikatiónir fólkini hava, sum saman við landstýrismanninum nú skulu deila fólksins ogn ókeypis til folk, sum búgva í eystur-, mið og suðurøkinum í landinum.*

*Miðlastunti hjá Høgna Hoydal eydnaðis fullkomiliga, tí eingin tosar um, at hetta gongur beinleiðis móti samgonguskjalinum og vallyftum hjá Tjóðveldi, ella hví landsstýrismaðurin valdi framstandandi tjóðveldisfólk í nevndina og enntá nevndarlim í reiðarasamtaki, sum afturvendandi hevur verið í stríð við myndugleikar og manningarfeløg.*

*At landstýrismaðurin valdi sjálvur at stýra miðlingini av søguni var tí at hann sjálvandi veit hvussu týdningarmikil søgan var og hvussu stór øsingin kundi verða um "rætta søgan" ikki var borðin fólkinum.*

*Landstýrismaðurin, sum er vælútbúgvin miðlamaður, visti sjálvandi, at eftir at søgan hevði verið presentera á "rættan hátt" í KVF var hon "fyrna" og líti áhugaverd hjá øðrum miðlum at viðgera.*

*Og rætt fekk hann.*

*Datt niður á áhugaverda grein í Norðlýsinum, sum Høgni Hoydal skrivar Norðlýsinum mikudagin 23. februar 2011 (valár til Løgting og Fólkating) um politiska útveljing. Sí pdf.*

----

NB: Í skjølum frá Fiskimálaráðnum sæst at útveljingin av nevndarlimum til nevndina, sum skal avgera hvørjir persónar fáa menningarkvotir ókeypis frá landinum, varð gjørd eftir óformligar samrøður millum landsstýrismannin í Fiskimálum og leiðsluna í Fiskimálaráðnum.

Eisini var tað Høgni Hoydal sjálvur sum valdi fyrrverandi valevni hjá Tjóðveldi  til Formann í nevndini og varaformannin.

Tann 2. februar 2019 skrivaði Norðlýsið:

*Spinn ella beinleiðis "fake news"?*

*Tað tykist sum um at Fiskimálaráðharrin hevur megnað at spunni politiskt gull burtur úr einari umhvørvisligari "tikkandi bumbu" í samband við ovurfiskiskapin eftir makreli í Norðuratlantshavinum.*
*Í vikuni bórust tíðindini um at øll londini sum eru við í strandalanda (ó)semjuni nú missa sína MSC góðkenning, tí fiskiskapurin ikki er burðardyggur. Hetta hava allir partar verið fultgreiðir ivir í longri tíð og tí koma tíðindini um mistu MSC góðkenningina ikki óvart á.*

*Ótespiligt politiskt spinn*
*Strandalondin forlongdu beint undan árskiftnum avtaluna frá 2014 tí tey megnaðu ikki at finna nakra nýggja semju.*
*Hetta harmast londini um i enska tekstinum í skrivinum tey í felag sendu út fyri kortum.*
*Semjan sum ES Føroyar og Norra gjørdu í 2014 og sum eisini umfatar Grønland og ísland er sostatt enn í gildið, MEN tá Grønland og Ísland ongantíð hava góðtikið hesa semjuna so er eingin semja í veruleikanum.*
*Men á heimasíðuni fisk.fo er ósemjan fullkomiliga umskrivað og verður gjørd til ein sigur fyri Føroysku samráðingarnevndina, og Høgna Hoydal:*
*....Eftir drúgvar samráðingar og fimm samráðingarumfør, sum hava verið í London, Clonakilty og Bergen hava Føroyar, ES og Noreg í dag undir føroyskum formansskapi og leiðslu gjørt semju í Bergen um at leingja Makrelsemjuna til 31. desember 2020.....?????*

*Harafturat kemur landstýrismaðurin við hesum  boðskapi til føroya fólk í tíðindaskrivinum tann 29.11.2018 á fisk.fo:*
*"Høgni Hoydal, fiskimálaráðharri, sigur, at Føroyar, ES og Noreg hava víst í verki, at tey ætla at halda fram við býtinum í Makrelsemjuni frá 2014, har makrelfiskiskapurin verður skipaður á einum* ***burðardyggum*** *grundarlagi í einum rættvísum býti.,,,,,"*

*Strandalondini fiskað tvífalt tað sum ICES mælir til og í dag bórust so tíðindini um at makrelfiskiskapurin missir sína MSC góðkenning. Alt hetta hendir meðan Føroyar hava formansskapin í strandalanda samstarvinum.*
*Vit kunnu í øllum førum staðfesta at miðlingin úr fiskimálaráðnum minnir ikki sørt um Norður Koreanskar tilstandir.*

*Orsøkin er sjálvandi at føroyingar hava eitt stýrið, sum byggir allan sín politikk á støðugt hækkandi kilogjald frá ótálmaða uppisjóarfiskiskapinum í Norðuratlantshavinum og í løtuni eru politisku oddafiskarnir upptiknir av at finna eina politiska semju, sum hækkar almennu inntøkurnar frá serliga makrelfiskiskapinum samstundis sum fleiri nýggir aktørar skullu sleppa framat uppisjóartilfeinginum.*
*Samstundis framstanda Tjóðveldi, Javnaðarflokkurin og Framsókn sum politiskir garantar fyri burðadyggum fiskiskapi og almennari vælferð.*

*Ovurfiskiskapur, gramleiki og burðardygg veiða eru hvør sítt, men Fiskimálaráðið megnar at fáa tey at verða tað sama.*
*Í politikki ber væl alt til? - Hvat halda makrelarnir?*
SÍ https://nordlysid.fo/tidindi/58247/spinn-ella-beinleidis-fake-news

**Ein fjølmiðil skal lýsa naknar veruleikar**

Ákærurnar frá Fiskimálaráðnum kunnu í best lagi bókast, sum løgfrøðiligt orðaspæl og tað kunnu vit sum fjølmiðlar ikki blanda okkum uppí.
Okkara uppgáva sum fjølmiðlar er at greina fløktar politiskar semjur og veruleikar fyri okkara lesarum, og at verja borgararnar í samfelagnum ímóti at makthavarar, í hesum føri ein politiskur- og umsitingarligur myndugleiki, sum borgarar landsins hava valt at umsita og fordeila tey stóru og dýrabaru virðini í okkara fiskatilfeingið, ikki røkir sína skyldu ella livir upp til tað veljarin/borgarin kunnu krevja av fólkavaldum politikarum.

Vit hava í fleiri førum spurgt Fiskimálaráðið spurningin; í hvørji løgtingslóg landsstýrismaðurin hevði heimild til at tryggja raksturin hjá ávísum aktørum samstundis sum hann tók rættindi frá øðrum.

Og teldupostarnir frá Fiskimálaráðnum vátta at har er eingin lógarheimild.

Vit sum miðlafólk mugu altíð verða íklødd til at lesa og viðgera tær mongu útsøgnir, sum politikarar, landsstýrisfólk og ikki minst ráðharrastovir koma við dagliga, og sum tey  sum makthavara ynskja, at vit bera víðari til okkara lesarar – til vanliga føroyingin.

Vit fjølmiðlafólka eru ikki løgfrøðingar og tí virkar tað sum ein fullkomin andsøgn til sjálvan grundsetningin í leigreglunum hjá Fjølmiðlanevndini fyri góðan fjølmiðlasið, sum vóru lýstar tann 14. Mai í 2008.

Veruleikin, sum vit sum miðil lýsa í greinini, sum kært verður um og sum fiskimálaráðið ynskir at krógva fyri føroyingum er, at **eingin** løgtingslóg, herundir ”Lóg um Sjófeingi” gav Høgna Hoydal ella Fiskimálaráðnum heimild til at geva ávísum vinnurekandi feløgnum, m.a. P/F Kinnfelli, UNDANTAKSLOYVI frá ásetingum, sum samtyktar vóru í lóg av Føroya Løgtingið og lýstar í kunngerð, at halda fram við fiskiskapinum - sum einans hevði sum endamál -  at tryggja ávís partafeløg fíggjarliga.

Tað at uppisjóvarskipið Katrin Jóhanna fekk loyvi til at halda fram at fiska uppisóvartilfeingið hóast tað var staðfest at tilfeingið kundi ikki gagnýtast eftir verkætlanini, hevði als onga heimild í nakrari lóg. Tað var heldur ikki í tráð við vilja løgtingsins og almenna politikkin hjá landsstýrismanninum.

At ein fólkavaldur politikkari, sum landsstýrismaðurin í Fiskivinnumálum Høgni Hoydal, skal sleppa avstað við at misbrúka embætisverki og senda hægstu løgfrøðina í Fiskimálaráðnum eftir Norðlýsinum, bert tí at vit sum fjølmiðil hava megna at avdúka hesi sera ivingarsomu viðurskifti í fiskimálaráðnum og ikki minst ivingarsomu framferð og ivasomu avgerðir hjá landstýrismanninum í fiskivinnumálum - harmar okkum almikið.

Vónandi eru limirnir í fjølmiðla kærunevndini somikið at sær komnir at slíkur eirindaleysur valdspolitikkur verður harðliga átalaður.

Vinarliga
John William Joensen,
prentari

Klaksvík
Tann 29. mars 2019